## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Maria Hansen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkini á Sambýlinum á Heygnum, á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, heilsusystrar og heimahjálpina fyri, at tit vóru so góð við hana.
Tøkk fyri góð orð í Sambýlinum, í Betesda og á grøvini.
Tøkk tit, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Zarepta.
Tøkk tit øll, sum fylgdu mammu okkara til hennara seinasta hvíldarstað.

**Marianna og Krissmund**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu og sum hjálptu til, tá ið kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Lina Høgnesen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Ein serstøk tøkk til Norðoya Ellis- og Røktarheim og starvsfólkini í Uppistovu, ið vóru um hana seinastu tíðina.

**Símun og dreingirnir við familjum**

### 60 ár

Sunnudagin 7. juni verður Eirikur Gunnarsson á Signabø 60 ár. Dagurin verður hildin í heiminum í Jóhansgøtu 1 á Signabø frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin.



### Petur F. Jacobsen 90 ár

Hesin gamli fyllir runt. Í tí sambandi verður opið hús í Meinigheitshúsinum Sharon í Sandavági leygardagin 13. juni 2009 frá kl. 16.00. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagurin**
**5. juni. Grundlógardagur**, hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849. Í Føroyum kom lógin í gildi sum vanlig lóg árið eftir. Jákup Dahl próstur var føddur í Vági hendan dagin í 1878 og doyði í 1944.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

*Altjóða umhvørvisdagur er í dag 5. juni. World Miljø Day varð samtyktur av ST-aðalfundinum í 1972.*

# Eirikur Gunnarsson 60 ár



Sunnudagin 7. juni fyllir Eirikur Gunnarsson á Signabø 60 ár.

Eirikur er úr Havn, sonur Sylviu, f. Rasmussen, úr Fuglafirði, og Tryggva Gunnarsson úr Vági.

Eirikur er elst av fýra systkjum, hini eru Ingunn og Randi, sum báðar búgva á Norðasta Horni í Havn, og Victor, sum býr í Danmark.

Eirikur fór í maskilæru hjá Wenzel Petersen frá 1965-70. Síðan fór hann viðtrúboðanarfelagsskapinum OM (Operation Mobilisation), har hann umvældi bilar hjá felagsskapinum í Belgia og sigldi við trúboðanarskipinum Logos 1. Hann var við OM frá 1971 til 1975.

Í 1977 giftist Eirikur við Marjun á Bergi úr Klaksvík. Eftir at tey vórðu gift, fluttu tey til Danmarkar, har hann fekk sær útbúgving sum maskinmeistari og varð liðugur í 1980. Tey fluttu til Klaksvíkar í 1980 og síðan í nýggj hús á Signabø í 1982.

Eirikur hevur hevur altíð havt stóran áhuga fyri øllum sum hevur við maskinur at gera, og hann hevur siglt sum maskinmaður meginpartin av lívi sínum. Hann hevur siglt við Krúnborg, nøkur ár sigldi hann í Grønlandi, umframt skipum hjá Strandfersluni í Føroyum. Seinastu árini hevur hann siglt við Sundaberg hjá JFK.

Marjun og Eirikur eiga tvey børn: Sámal (31 ár), og Silvia (25 ár).

*-red*

# Opið hús á Kongabrúnni

**Mentanarnáttina hevur Tryggingarfelagið Føroyar opið hús á Kongabrúnni**

Fyri fyrstu ferð letur Tryggingarfelagið Føroyar húsið upp fyri almenninginum. Hetta hendir í kvøld, Mentanarnáttina, frá kl. 19 – 21.

Tað er soleiðis, at høvuðssætið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er ein eind av fimm bygningum, sum eru samanbygdir. Talan er um gamla bygningin hjá Dimmalætting, Kamarsbygningin, har sum kømurini hjá Hotel Føroyar vóru, Geilin, har sum Føroya Gjaldsstova var, Niels Argebygningurin og Rosenborg, har sum Hotel Føroyar var og Tryggingarfelagið Føroyar er.

Høvi verður hjá teimum vitjandi at fara rundtúrar í søguligu bygningunum við frásøgufólki hvønn hálvan tíma. Eisini ber til at hyggja at bygningunum einsamallur. Høvi verður eisini at síggja øll listaverkini, sum eru keypt gjøgnum øll árini felagið hevur verið til.

Samstundis sum húsið er opið, verður livandi tónleikur á torginum, eins og te og kaff i verður at fáa.

Tiltakið er ókeypis, og øll eru vælkomin, verður sagt frá Tryggingarfelagnum Føroyar.

*-red*

